# Glistrup: Vitji Føroyar 42. hvørt ár

GESTUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Ingi Mohr heilsar her upp á Mogens Glistrum. Glistrup er kendur í Føroyum og tað løtuna Sosialirin tosaði við hann vórðu vit ofta avbrotnir av føroyskum beundrarum, sum heilsaðu upp á Glistrup.*

*Mynd Jens Kr. Vang*

Klokkan er hálvgum ellivu mánamorgun, ein ónevnd kelda er í telefonini og sigur, at kendi danski politikkarin og sakførarin Mogens Glistrup situr í Vágsbotni og lesir okkara blað. Tað er ikki fyrsti apríl, vit eru komin út í juli. Vit vága og koyra beinleiðis heim í Vágsbotn í Havn, har Mogens Glistrup situr. Hann er 76 ára gamal, slitin og kanska eitt sindur órakaður, men hevur framvegis kviku eyguni og hugsar seg ikki eitt sekund um, áðrenn hann svarar.

- Eg eri her 42. hvørt ár og næstu ferð er komið at vitja føroyingar, tá verið eg 118 ár. Fyrstu ferð eg var í Føroyum var í 1960. Tá kom eg við ferðamannaskipinum Dr. Aleksandrine á veg til Reykjavíkar á ein norðurlendskan juristafund. Tað var ein góð vitjan og nú eri eg aftur, men í heilt øðrum ørindum. Eg eigi eina abbadóttir, hon er 10 ára gomul og seinastu fimm árini hava vit verið røsk at ferðast við henni. Also ikki eg og konan einsamøl, men eisini dóttir okkara og so svigarsonurin, sum er eitt slag av ferðafyrireikara fyri okkum. Tað er hann, sum tekur sær av øllum tí praktiska og vit fylgja bara við. Akkurát nú siti eg her sum avtalað, og bíði eftir hinum, tey eru og gera okkurt ørindi í býnum og vit avtalaðu, at eg skuldi sita á hesum bonkinum, so tey kunnu finna meg aftur. Eg havi vitjað undirhúsiið og javnaldrarnar har, sigur Mogens Glistrup eitt sindur speiðsamur.

Og vit fáa ikki rættuliga náðir at práta, tí Glistrup er kendur maður í Føroyum, og nógv koma og heilsa uppá hann. "ER DETTTE IKKE MOGENS GLISTRUP; MIN SANN" sigur ein eldri maður og stevnir beina leið móti bonkinum og tekur í hondina á Glistrup. "DU SKULLE STIDLE OP TIL VORES LAGTING, SÅ VILLE DER KOMME SKIIL Á PÅ FÆRØERNE:" Fleiri aðrir heilsa Glistrupi, men móti allarari vanligari siðvenju, so óttast teir myndamannin og hava hug at kráma á linsuni, so løtan ikki verður gjørd ódeyðilig.

Kennir tú fólk í Føroyum?

- Ikki tað stóra, eg læs kanska saman við onkrum, men havi gloymt navnið. Jú forrestin Halgir Winther Poulsen byrjaði hjá mær sum fultrúi, áðrenn hann gjørdist sakførari. Hittir tú hann so heilsa endiliga. Eg havi lært hann upp, sigur Mogens Glistrup við einum smíli.

Fylgir tú við í føroyskum politikki?

-Ja, tað geri eg og tað er rættuliga einfalt í løtuni. Her stendur 16-16 í fullveldisspurninginum og skulu føroyingar gera sær dreymar um fullveldið, so má ein meiriluti finnast fyrst. Eg haldi sjálvur, at ein tillagingartíð til fullveldi upp á eini 10-15 ár er nóg mikið. Annars er tað heilt skeivt, at Føroyar nakrartíð komu at hoyra til Danmark. Tveir klutraðu í tí upp undir endan av napoleonskrígnum. Føroyar, Ísland og Grønland hoyra náttúrliga til Noreg og ikki Danmark, sogur Mogens Glistrup.

Tú hevur ofta úttala teg um samansetingina av danska fólkinum, er tú framvegis bangin fyri danska fólkinum?

Ja. tað er so befríandi at sita her í Vágsbotni og síggja, at her eru tað føroyingar sum búgva. Tit koma at ráða í Føroyum næstu mongu árini. Í Danmark er tað soleiðis, at heldur verandi gongd fram, so eru muhamedanararnir í meiriluta, áðrenn hendan øldin er hálvrunnin og tá kunnu teir seta egnar lógir í verk og stýra øllum, sigur Mogens Glæistrup.

Er tú ein nøgdur fyrrverandi politikkari?

Eg veit ikki hvussu fyrrverandi eg eri. Eg var sakførari, og lógirnar sum politikkararnir smíðaðu, vóru burtur úr vón og viti. Eg mátti gera okkurt við hetta og gjørdist politikkari. Nú eri eg pensioneraður og fegnist um, at tann politikkur, sum eg kom fram við, verður førdur í dag í odd og egg. So kann tað vera líka mikið hvør fær heiðurin, bara vit flyta okkum á rættari leið, og tað er júst tað sum hendir nú, sigur Mogens Glistrup.

Uttan at koma inn á hvat hann meinar við hesum, sipar Mogens Glistrup til nýggja politikkin hjá stjórnini, sum ger tað truplari hjá útlendingum at flyta til Danmark.

Glistrup kom til Føroyar við Norrønu og skal vitja kring landið í nakrar dagar. Hann fer avstað aftur fríggjadagin til Hansholm.

-Jeg skal se på fuuugle, sigur hann við einum smíli á reinum bornholmsmáli og fer at tosa við viðhaldsfólk í Føroyum og tey eru slett ikki so fá.



*Glistrup er kvikkur í replikkini og undirritaði skuldi skunda sær, skuldi hann fáa nakað niður á blokkin frá hesum orðatítta manni.*

*Mynd. Jens Kr. Vang*

Sjúkradagbøkur stolnar í Vági:

# Ansingin var ov vánalig

**Tíggju sjúkradagbøkur ella journalir vórðu seinasta vikuskiftið stolnar á Læknamiðstøðini í Vági. Jenis av Rana, kommunulækni, fann tær aftur á trappuni uttanfyri viðtaluhøli síni í Havn. Ansingin av dagbøkunum í Vági hevur ikki verið nóg góð, tí tjóvurin slapp alt ov lætt framat**

TJÓVARÍ
*Stefan í Skorini*




*Jenis av Rana, kommunulækni, fann sjúkradagbøkurnar aftur næstseinasta mánamorgun, tá hann kom til arbeiðis. Tíggju sjúkradagbøkur vórðu seinasta vikuskiftið stolnar úr einum ólæstum skápi í Læknamiðstøðini í Vági*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ansingin av sjúkradagbókum á Læknamiðstøðini í Vági hevur ikki verið nóg góð. Seinasta vikuskiftið,tá jóansøkan var í Vági vórðu tíggju tilvildarligar dagbøkur stolnar av miðstøðini. Tær vórðu tó funnar aftur uttanfyri viðtaluhølini hjá Jenisi av Rana við Tinghúsvegin í Havn.

Ein sera løgin tilburður, har tjóvurin hevur stolið dagbøkurnar á Læknamiðstøðini og síðani borið tær aftur til ein lækna, sum kundi beina tær aftur á rætta stað.

### Slapp lætt framat

Løgreglan í Suðuroy upplýsir, at sjúkradagbøkurnar eru stolnar einaferð leygardagin ella leygarkvøldið, tá læknin á miðstøðini hevði úr at gera. Viðkomandi hevur tikið tíggju tilvildarligar dagbøkur úr skápinum, men einki bendir á, at tjóvurin hevur leitað eftir ávísum dagbókum.

Løgreglan metir hetta málið at vera sera álvarsamt, tí sjúkradagbøkur innihalda privatar og sera viðkvæmar og persónligar upplýsingar, sum fólk ikki ynskja, at nakar annar óviðkomandi persónur fær innlit í. Tí eigur eftirlitið av slíkum skjølum at vera sera strangt.

Tað hevur tað ikki verið í hesum førinum, metir løgreglan. Tjóvurin hevur ikki brotið inn, men er sloppin ótarnaður framat, tí hvørki skápið ella hurðin hava verið læst.

Læknin, sum kom til arbeiðis sunnumorgunin, varnaðist, at dagbøkur vóru horvnar, og hon boðaði løgregluni frá beinanvegin.

Læknamiðstøðin í Vági er soleiðis innrættað, at sjúklingar skulu ganga ígjøgnum skrivstovuna, har sjúkradagbøkurnar liggja, fyri at sleppa inn í viðtaluhølið. Tí kann tað hugsast, at meðan læknin hevur havt ein sjúkling inni, hevur onkur verið inni í skrivstovuni og tikið dagbøkurnar.

### Fekk dagbók í dansinum

Ein kvinna í Vági boðaði sunnumorgunin frá, at ein ungur maður hevði verið á gátt við hennara sjúkradagbók.

Hann hevði fingið sjúkradagbókina í hondina í jóansøkudansinum í VB-høllini. Hann hevði fingið hana frá einum ókendum manni, og hann hevði goymt dagbókina, tí hann visti, at hon ikki hoyrdi heima í dansinum. Tá hann var á fótum aftur sunnumorgunin, fór hann til kvinnuna, sum átti sjúkradagbókina.

Tá tjóvurin er komin Havnar, hevur hann eftir øllum at døma angra gerðina. Tí tá Jenis av Rana, kommunulækni, kemur til arbeiðis mánamorgunin, finnur hann hinar níggju dagbøkurnar á trappuni.

Løgreglan heldur ikki, at gerningsmaðurin hevur havt í hyggju at nýta upplýsingar úr dagbókunum til nakað serstakt endamál. Løgreglan er ikki farin undir at kanna málið meira nágreiniliga enn, men hetta verður gjørt skjótast gjørligt.

Landslæknin, sum hevur allar landsins læknar undir sær, verður eisini kunnaður um málið.

Sjúkradagbøkur:

# Læsast inni framyvir

TJÓVARÍ
*Stefan í Skorini*

– Hetta er sera snópisligt hjá okkum, sigur Anne Birgitte Dahl-Hansen, sum er lækni í Vági og dagliga arbeiðir á Læknamiðstøðini. Framyvir fara tey at hava dagbøkurnar undir lási.

– Vit fara at biðja Vágs kommunu um at útvega okkum arkivskáp, so at vit kunnu læsa sjúkradagbøkurnar inni, tí slíkt má ikki henda aftur, sigur kommunulæknin Anne Birgitte Dahl-Hansen, sum er sera kedd um hendingina.

Hon greiðir frá, at tey ikki hava havt sjúkradagbøkur innilæstar fyrr, tí eingir trupulleikar hava verið av hesum. Nú fara tey tó at broyta nakrar mannagongdir í hesum sambandi.

– Frá nú av fara vit altíð at hava hurðina inn í skrivstovuna læsta, so at óviðkomandi ikki sleppa framat. Hetta er sera óhøgligt hjá okkum, sum arbeiða her, men soleiðis má tað vera, inntil vit fáa nýggj skap at goyma dagbøkurnar í, sigur læknin.

Hon sigur, at tá hon kom til arbeiðis sunnumorgunin, stóðu tómar brennivínsfløskur og ølfløskur í bíðirúminum. Tí er lætt at hugsa sær, at okkurt óregluligt er farið fram dagin fyri.

Læknin, sum var á vakt tann dagin, er farin av landinum í summarfrí, og henni fingu vit ikki hendur á.

# Ferðsluvanlukka kravdi eitt mannalív

**Ein syndarlig ferðsluvanlukka kravdi eitt mannalív í Klaksvík leygarnáttina. Ein 21 ára gamal maður doyði av løstunum, sum hann fekk. Tveir aðrir menn vóru í bilinum, men teir eru slopnir hampuliga væl frá hendingini**

FERÐSLUVANLUKKA
*Stefan í Skorini*



*að var her, at førarin misti tamarhaldið á bilinum, sum fór bóltandi eftir vegnum. Ein 21 ára gamal maður doyði í ferðsluvanlukk uni*

Løgreglan í Klaksvík heldur, at ov nógv ferð helst var orsøkin til ræðuligu ferðsluvanlukkuna leygarnáttina, sum endaði við, at ein ungur maður lá eftirá. Maðurin, sum doyði, er 21 ára gamli Høgni á Steig úr Klaksvík.

Tríggir mans í einum bili koyra eftir vegnum, sum nevnist undir Fossum í Klaksvík. Móti endanum sneiðir vegurin omaneftir til vinstru, og ætlanin hjá føraranum er at venda niðaneftir aftur til høgru.

Bilurin rennir tó á eitt skelti, ið stendur við vegjaðaran. Førarin missir tamarhaldið á bilinum, sum fer bóltandi eftir vegnum. Alt bendir á, at bilurin er farin runt. Hann steðgar einar 40 metrar frá staðnum, har skeltið stóð.

21 ára gamli maðurin verður slongdur úr bilinum og fær somikið álvarsaman skaða av óhappinum, at hann doyr á sjúkrahúsinum í Havn nakrar tímar seinni.

Løgreglan í Klaksvík vil ikki upplýsa um talan var um rúsdrekkakoyring, men at hon framvegis kannar málið. Heldur ikki ber til at fáa upplýst enn, hvør koyrdi bilin.

Hinir báðir menninir, sum eru 22 og 21 ára gamlir, fingu ikki so álvarsamar løstir. Annar teirra varð eisini slongdur út, meðan hin var sitandi í bilinum. Annar er longu útskrivaður av sjúkrahúsinum, meðan hin framvegis er innlagdur.

# 14 ára gamlir hóttu mann við knívi

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Tveir 14 ára gamlir dreingir framdu eina røð av innbrotum og herverki í Havn sunnunáttina. Endin var, at teir hóttu ein vaksnan mann við knívi, áðrenn løgreglan handtók dreingirnar, sum hóast sín unga aldur eru kenningar hjá løgregluni

Teir báðir dreingirnir løgdu fyri úti á verkstaðnum Vónini úti í Álakeri. Har brutu teir eitt portur upp og fóru síðani inn ígjøgnum eitt vindeyga. Har tóku teir felliknívar, sodavatn og smápengar.

Síðani fóru teir umborð á skipið Thomas Nygaard, sum lá á skipasmiðjuni. Har brutu teir inn í skápið við heilivági og tóku upp í ein beriposa av ymsum heilivági.

Hildið var fram yvir ímóti Skálatrøð. Við Skeiva pakkhús lógu bátarnir Fortuna og Sævarenni. Dreingirnir fóru umborð og blástu ein bjargingarbát upp, men skóru eisini hol á bátin. Harumframt tendraðu teir eitt neyðbluss.

Ein maður, sum hoyrir gangin frá dreingjunum, kemur framvið og roynir at steðga teimum. Hann verður tó álopin við fellikníví, men fær vart seg við at taka í armin á tí eina.

Hann verður so noyddur at fara avstað aftur og senda boð eftir løgregluni. Annar drongurin kastar eisini ein felliknív eftir manninum.

Løgreglan tók dreingirnar við á støðina, har barnaverndin var við í avhoyringunum. Báðir eru bara 14 ára gamlir og kunnu tí ikki ákærast.

Báðir dreingirnir vóru ávirkaðir av rúsdrekka ella øðrum evnum, og teir hava báðir verið í hóslag við løgregluna fyrr, upplýsir kriminaldeildin á politistøðini.